# Skúlastýrisfundur 12.apríl

**Møtt vóru**: Marianna F, Marianna H, Ann Mari og Marjun

**Skrá:**

1. Hoyring viðvíkjandi innskriving til fólkaskúlarnar – hoyringsfreistin er longd til 17.apríl. Uppskot er viðheft.
2. Status viðvíkjandi bussteðgiplássinum.
3. Hvussu miðla vit betri um skúlastýri – dagføring av heimasíðu – tlfnr, mynd, umboðandi barn/børn / Hvussu røkka vit út til foreldraumboðini?
4. uttanduraøki á skrá. - Td. Nógv órudd og manglandi tøming av skrellispannum. Ábyrgd og hvat kann betrast.
5. innandura øki á skrá -Hvussu gongur við skógvafría "átakinum". Fylgja bæði lærarir og børn hesum.
6. WC, hvat kann gerast fyri at betra um reinføri, so øll føla seg væl at fara á wc. Eru tankar um at býta upp í gentu og dreingja wc.
7. Lærugreina- og tímabýtið til komandi skúlaár.
8. Kunning:
    a. Umvælingararbeiðið.
    b. Næmingar við sálarligum avbjóðingum.
9. Ymiskt

Ad. 1. Tá foreldur velja forskúla, er tað tí tey velja skúla til í mun til barnagarð. Tað er tí neyðugt, at foreldrini kenna fortreytirnar eisini nøkur ár frameftir fyri at taka støðu. Hetta merkir at barnatalið og skúlamarkið er kent, hvussu skúlamarkið flytir seg frá ár til ár.

Hetta er uppskot til leiðreglur:

1. innskrivingin er komin, áðrenn freistin er farin
2. barnið býr nærindis skúlanum 1
3. barnið gongur í forskúla í skúlanum og hevur systkin í skúlanum
4. barnið hevur systkin í skúlanum
5. barnið gongur í forskúla
6. onnur serlig viðurskifti

Stýrið ynskir at raðfesta øðrvísi so at 2 og 3 býta um pláss.

Síðan ynskir stýrið at seta spurningar tekin við teigin sum snýr seg um Nám X og skúlan á Fløtum.

1) Hvat verður næmingagjaldið nýtt til?

2) Hvørjar leiðreglur eru gjaldandi fyri tey, sum sleppa inn í ítróttarskúlan?

Tað er sáddur ivi um, hvørjar leiðreglur eru galdandi fyri upptøku av næmingum á ítróttarrásina.

Ad 2. Marianna F hevur verið á fundi við Tróndur og Boga, har móttøkan var sera ja-lig.
Teir halda at spurningurin um busssteðgiplássið er meira ein avgreiðsluspurningur.

Marjun hevur tosað við Katrin Nielsen á teknisku deild. Katrin sigur at arbeitt hevur verið við málinum. Landsverk hevur hugt uppá viðurskiftini og hava sínar hugsanir um, hvussu trygdin kann betrast.
Hetta er eisini ein samráðingarspurningur við bussførarnar, so teirra viðurskifti eru í lagi og til at liva við.

Málið bíðar til eftir summarferiuna, tá verður roynt at fáa politisku limirnar í stýrinum uppá mál viðvíkjandi buss steðgiplássinum.

Ad. 3. Tað mangla onkur tlf. nr. og teldupost adressur sum skulu dagførast.

Marianna, formaðurin sendur út eitt skriv til foreldraumboðini fyri bara at lata frætta frá stýrinum.
Foreldraumboðini verða kallaði inn til fundar eftir summarfrítíðina.

Ad. 4. Tað hevur verið gongd í hesum málið í fleiri ár, men tað hevur verið ein umsitingarlig fløkja.

Spurningurin hevur verið, um parkeringsøkið er alment ella er ein partur av skúlanum. Tekniska øki hevur sett nakrar gamlar ruskspannir upp og kemur fólk frá kommununi at tøma spannirnar av og á. Ruskspannirnar rúma bara ikki øllum ruskinum og krákurnar draga úr spannunum soleiðis at tað verður sløtt um alt økið. Ruskið fer rund økið rundan um skúlan, sum skúla varðarnir umsita. Húsavarðaumsitingin varar av skúlavørðunum.

Skúlin hevur í samstarv við Mentamáladeildina roynt at fáa hetta endaliga loyst, men enn hevur loysnin ikki verið nøktandi, tí so nógvir partar vara av hesum.

Ad 5. Tað gongur betur. Vaskingin hevur sínar avbjóðingar tí fólk mala ígjøgnum høvuðsøkið allar tíðir á døgninum, so nú hava vit náttarvask ístaðin.
Lærarar ganga eisini inni í inniskóm.

Ad 6. Vesini verða hildin rein til skúlabørnini.
Deildirnar verða vaskaðar eftir skúlatíð.
Vesini á høvuðsøkinum fyrst á morgni, soleiðis at skúlabørnini hava rein vesi tá dagurin byrjar. Vesini eru vanliga rein og væl hildin.

Annað er at tað kemur meir enn so fyri, at tað eru næmingar ið hava tað ringt. Hetta kann koma til sjóndar við at tey lata skarn og piss eftir seg á vesinum á ein ódámligan hátt. Hetta er ein avbjóðing sum ikki er so løtt at loysa, tí eftir nógv orðaskifti og kanningar, er komið fram til at talan er um næmingar sum hava tað ringt ella eru kroyst.

At býta vesini upp eftir kyni, er neyvan vegurin at ganga í dag. Tað eru fleiri møguleikar at koma til eitt opið vesi um tey ikki eru kynsbýtt.

Ad 7. Tímabýtið var lagt fyri stýrinum. Flokkar tímatal o . s. fr.

Spurt bleiv eftir tøkni og hvussu tað bleiv skipað.

Floksins tími er valdur, tí skúlin roynir at seta inn við átøkum fyri trivnað

Talið av næmingum við sálarligum avbjóðingum er vaksandi, henda støðan er sera ørkymlandi, tí tíðin til bæði greining og viðgerð er long. Skúlanum er álagt at finna loysnir ímeðan innan fyri karmarnar á skúlanum.

Ad. 8. Tað verða ikki fleiri fundir hetta skúlaárið, tí vit hava longu havt tríggjar fundir og skúlaárið er um at halla og royndar- og próvtøkutíð liggja fyri framman.
Tað eru tó fleiri fundir í samband við setanir til komandi skúlaár.